## Ein Blanding í Tvøroyrar Klubba

At fáa eina blanding í einum klubba er ikki løgið í sjálvum sær, men hesaferð er talan um bólkin Ein Blanding, sum fer á pall í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið.

Ein Blanding er vælmannaður bólkur úr Suðuroynni, ið telur royndar tónleikarar. Leygarkvøldið fer bróðurparturin av manningini á pall í klubbanum á Tvøroyri. Jonhild, Knút, Hjalmar og Dagfinn borga fyri góðum nýggjum, yngri og eldri tónleiki, so okkurt er til mestsum øll oyru.

Bólkurin Ein Blanding hevur verið sera umbiðin og virkin í vetur og leygarkvøldið eru tað klubbagestir á Tvøroyri, ið kunnu njóta blandaða tónleikin.




# Smyril Line betrar úrslitið við stívliga 50 milliónum krónum

**Framgongdin hjá Smyril Line í 2006 hevur verið stór, og tí kann reiðaríið í dag almannakunngera, at avlop er á roknskapinum. Úrslitið er betrað heilar 53 milliónir krónur eftir bert einum ári. Raksturin er komin í eina trygga legu, og útlitini fyri komandi árið eru góð**

UTTANLANDSSIGLING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.foi*

Seinasta árið hava starvsfólk og leiðsla í Smyril Line vent gongdini í reiðarínum. Avlop er á roknskapinum fyri 2006, og úrslitið er betrað heilar 53 mió.kr. Úrslitið er eitt avlop á 1,6 mió.kr. móti einum halli á 51 mió.kr. fyri einum ári síðani.

- Vit fegnast um, at hallið er burtur, og at fyrsta stigið í endurreisingarætlan okkara hevur eydnast. Um felagið framhaldandi skal mennast, er tó ikki nøktandi við hesum staka úrslitinum. Enn eru stórar avbjóðingar fyri framman, og komandi úrslit skulu tryggja ein sunnan vøkstur eisini frameftir, sigur Thomas Magnussen, stjóri í Smyril Line.

Vøksturin í 2006 hevur verið stórur orsakað av avgerðum og broytingum fyri einum ári síðani. Starvsfólkini hava lagt nógv fyri, og úrslitið er positivt fyri fyritøkuna. Farna árið vísir serliga, at raksturin er komin í eina trygga legu.

Nýskipaða sølu- og marknaðararbeiðið í Europa ber ávøkst, og Smyril Line kann vísa á inntøkuvøkstur á øllum økjum. Vøksturin í søluni er 23 prosent ella 39 mió.kr., og samstundis eru nýggir inntøkumøguleikar skaptir. Ferðaseðlarnir eru vorðnir bíligari, og talið av ferðandi er økt 40 prosent. Seinasta árið eru inntøkurnar frá frakt øktar 17 prosent.

Við ársenda var eginpeningurin 177 mió.kr., og tað merkir, at Smyril Line er ein fíggjarliga sterk fyritøka.

- Raksturin er effektivur. Tað sæst millum annað aftur í, at manningarútreiðslurnar eru óbroyttar, hóast 40 prosent fleiri ferðafólk hava valt Smyril Line seinasta árið. Vit hava nógv at takka starvsfólkunum fyri, sigur Thomas Magnussen, stjóri.

2007 er eitt spennandi ár við nýggjum avbjóðingum, og útlitini fyri árið eru góð. Leiðslan í reiðarínum roknar við, at árið vignast væl við framhaldandi vøkstri innan ferðafólka- og farmaflutning.

Aðalfundurin í P/F Smyril Line verður væntandi í apríl 2007.

# Fyrsta sendingin av putlara-klæðum

Í eina tíð hava fólk hjá Reyða Krossi bundið og seymað pløgg úr bummull í hópatali.

Nú fer fyrsta sendingin av hesum putlara-klæðunum avstað. Ein partur fer til eitt av fátækastu londunum í Europa, Hvítarusland.

Her er talan um pløgg úr bummull, sum annaðhvørt eru bundin ella seymað til húgvur, troyggjur, kjólar, undirklæði og annað.

Fyrrapartin í dag var Suni Vinther farin undir at pakka øll hesi klæðini niður í eskjur, nú ætlanin er at fáa tey til røttu viðkomandi.

Hetta tiltakið byrjaði á vári í fjør, og hava føroyskir putlarar tikið sera væl undir við tí.

Samstundis við at putlaraklæðini verða send av landinum, fara somuleiðis 45 brúktar fartelefonir sama veg.

Her er talan um fartelefonir, sum fólk lata inn til Reyða Kross og sum síðani sendir tær til Onglands. Her fær felagsskapurin millum 30 og 40 krónur fyri hvørja teirra.



*Suni Vinther pakkar putlaraklæðini niður*
*Mynd: Jens Kr. Vang*